Uttanríkis- og mentamálaráðið
Tinghúsvegur 7
Postrúm 3279
FO-110 Tórshavn

Tórshavn, tann 8. november 2022

Hoyring av uppskoti til løgtingslóg um Bókasøvn

Føroya Lærarafelag hevur fingið uppskot til løgtingslóg um bókasøvn (Bókasavnslógin) til hoyringar, og felagið hevur umrøtt uppskotið við nevndina í Skúlabókasavnsfelagnum.

Føroya Lærarafelag hevur hesar viðmerkingar til uppskotið:

Til § 4:

Vit mæla til, at ein skúlabókavørður verður fastur limur í bókasavnsráðnum.

Næmingar í fólkaskúlaaldri eru millum tey, ið oftast vitja skúlabókasavnið. Hetta gevur skúlabókavørðinum eitt gott innlit í áhugan og tørvin hjá børnum og ungum á bókasavnsøkinum. Ein skúlabókavørður kann tí verða ein góður ráðgevi hjá myndugleikunum í menningini av bókasavnsøkinum.

Til § 6:

Vit mæla til, at í *stk. 2*, verður sett inn eitt nýtt brot: "*ella ein lærara við skúlabókavarðaútbúgving."*

Ein lærari við skúlabókavarðaútbúgving er eins væl skikkaður til at røkja starvið á einum bókasavni, har fólkabókasavnið og skúlabókasavnið er í felags hølum, sum eitt starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgving.

Vit mæla til, at í *stk. 5*, verður " *skúlastýrið*" broytt til: *"skúlaleiðarin"*.

Tað er skúlaleiðarin, sum í tí dagliga arbeiðinum í skúlanum hevur ta yvirskipaðu ábyrgdina av virksemi skúlans. Tað er tí í betri samsvari við hesa ábyrgd, at skúlaleiðarin er umboðaður í bókasavnsnevndini heldur enn skúlastýrið.

Til § 11:

Í dag vegleiðir skúlabókavørðurin bæði næmingum og lærarum um tilfar v.m, og tí burdi verið lagt afturat í *stk 1, 1 pkt.* aftaná "*at menna førleikar hjá næmingum*": "*og lærarum*."

Í *stk. 2*, stendur, at skúlabókasøvn skulu vera í øllum skúlum. Sum er, eru fleiri smærri skúlar, sum ongar tímar fáa til at røkja skúlabókasavnsuppgávuna, tí eitt krav er ásett um minst 20 næmingar fyri at fáa tímar til endamálið.

Vit mæla til, at allir skúlar fáa eina serstaka játtan til at røkja skúlabókasavnsuppgávuna. Um hetta ikki ber til, eigur næmingatalið í smærri skúlunum í einum hóskandi landafrøðiligum øki at leggjast saman við næmingatalinum úr tí skúlanum í økinum, sum kann røkja skúlabókasavnsuppgávuna.

Tað er ein fortreyt fyri, at allir skúlar skulu kunna veita eina nøktandi skúlabókavarðatænastu, at skúlar fáa tíð játtaða og útbúnar skúlabókavørðir

Vit mæla til at sett verður inn eitt nýtt pkt. í *stk. 2. "Skúlabókasøvn skulu hava starvsfólk við skúlabókavarðaútbúgving."*

Tað er ynskiligt, at tað á sama hátt, sum tað er tilskilað í § 6, stk. 2, at fólkabókasøvn skulu hava starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgving, at tað verður sett sum treyt, at skúlabókasøvn skulu hava lærarar við skúlabókavarðaútbúgving.

Vit halda, at ásetingin í *stk. 3* er ógreið. Skal henda áseting skiljast soleiðis, at hon letur upp fyri, at skúlabókasavnið í einum skúla kann vera skúlabókasavn fyri fleiri skúlar, og næmingarnir mugu fara í skúlabókasavnið í tí skúla, ið samstarvið er við? Vit mæla til, at tað verður nágreinað, at eitt skúlabókasavn skal vera staðsett á hvørjum skúla.

Vit mæla til, at í *stk. 5* verður "*NÁM"* sett inn áðrenn*: "Landsbókasavnið".*

Í dag fáa skúlabókasøvnini ráðgeving og vegleiðing frá NÁMi til virksemi sítt. Henda skipan virkar væl og vit halda, at hon eigur at halda fram.

Til § 12:

Vit halda, at tað í viðmerkingum til lógina eigur at verða gjørt vart við, at kunngerðin um skúlabókasøvn eigur at verða dagførd samsvarandi lógini um bókasøvn.

Til § 18:

Vit mæla til, at í *stk. 1, nr. 1* verður "*undirvísing"* broytt til: *"útbúgving"*.

Sambært § 18, stk. 1, skal Landsbókasavnið skipa fyri *undirvísing og skeiðsvirksemi* fyri granskarum, lærarum, lesandi og øðrum, men onki verður nevnt um útbúgving av lærarum, soleiðis at teir kunnu lúka treytirnar at gerast skúlabókavørður. Sambært kunngerðini um skúlabókasøvn skal ein skúlabókavørður hava útbúgving sum skúlabókavørður. Tað tykist løgið, at samstundis sum tað verður álagt øllum skúlum at hava eitt skúlabókasavn, at ongir pengar verða játtaðir til endamálið ella at nakað verður nevnt um, hvussu hesin parturin skal loysast. Tað er ikki í lógaruppskotinum tikin hædd fyri, at tørvur er á útbúnum skúlabókavørðum og hvør skal standa fyri einari slíkari útbúgving.

Í álitinum um dagføring av bókasavnslógini: Bókasøvn ein mannarættur, stendur í tilmælinum frá arbeiðsbólkinum, at " útbúgvingar- og skeiðstilboð til bókavørðir, skúlabókavørðir og onnur starvsfólk á bókasøvnum verða nágreinað sum partur av høvuðsuppgávuni hjá Landsbókasavninum í samstarvi við viðkomandi útbúgvingarstovnar, eitt nú Fróðskaparsetur Føroya. Í sjálvum lógaruppskotinum stendur *undirvísing og skeiðsvirksemi*. Vit halda ikki, at *undirvísing og skeiðsvirksemi* kann sammetast við útbúgving og vit halda, at hetta eigur at verða nágreinað í lógini.

Aðrar viðmerkingar:

Samanumtikið halda vit, at tað er neyðugt við einari neyvari lýsing av teimum fíggjarligu avleiðingunum av lógaruppskotinum. Ongin ítøkilig meting er gjørd av, hvørjar fíggjarligar avleiðingar tær einstøku broytingarnar hava, og ongin játtan er sett av til endamálið. Her vantar m.a. ein játtan til útbúgving, skeiðsvirksemi og til økta talið av skúlabókasøvnum. Hóast tað er nevnt í viðmerkingunum til lógina, at skúlabókasøvn verða fíggjað av rakstrinum hjá viðkomandi skúli, vantar ein lýsing av fíggjarleistinum. Skúlabókasøvn hava bæði ein kommunalan og ein almennan rakstur; kommunur fíggja útreiðslurnar til bøkur, meðan land fíggjar útreiðslur til starvsfólk.

Vinaliga

Jacob E. Ols.

Jacob Eli Olsen, formaður

Føroya Lærarafelag